Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 27.06.2024 kl. 17:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
**Nevndarlimir:** Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Annika S. Biskopstø
**Varalimir:** Símun á Høvdanum møtti fyri Eyðstein Ó. Poulsen
**Ikki møtt:**
**Onnur:** Rúni Rasmussen, kommunustjóri
**Protokollførari:** Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 52/24 | 24/00008-5 | Býráðslimi berst frá at røkja býráðsarbeiðið í meira enn samfullar 14 dagar (Eyðstein Ó. Poulsen) |
| 53/24 | 23/00493-1 | Dagføring av almenna ásetingartekstinum í byggisamtyktini |
| 54/24 | 24/00532-6 | Matr.nr. 759g á Skarðhamri - umsókn um meirøki |
| 55/24 | 24/00674-2 | Marknaumskipan - matr.nr. 201a, 203b og 204a í Klaksvík |
| 56/24 | 24/00543-1 | Uppnormering til Barnaverndartænastuna |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 57/24 | 21/01807-47 | Møguligar viðtøkubroytingar |
| 58/24 | 23/00804-6 | Umsorganarheimið Gloria |
| 59/24 | 22/00549-106 | Støðutakan til tilboð upp á ogn |
| 60/24 | 24/00046-7 | Vegføring/dagføring av leigusáttmála |
| 61/24 | 24/00632-11 | Mgl. umfígging/lántøka |
| 62/24 | 24/00643-3 | Umsókn um leigustykki |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Til viðgerðar**

## 52/24
## 24/00008-5 Býráðslimi berst frá at røkja býráðsarbeiðið í meira enn samfullar 14 dagar (Eyðstein Ó. Poulsen)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 27.06.2024 | 52/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Eyðstein Ó. Poulsen, býráðslimur valdur fyri Fólkaflokkin, hevur boðað borgarstjóranum frá, at honum berst frá at røkja býráðsarbeiðið í tíðarskeiðinum 26. juni til 10. juli.
Næstvaldur á listanum er Símun á Høvdanum, ið hevur fingið fundarboð til býráðsfundin 27. juni 2024.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 18, stk. 2 og 3:

> *Stk. 2 Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
> *Stk. 3 Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sætið í býráðnum til fundin.

**Tilmæli:**
Býráðið verður at taka støðu til áheitanina um at innkalla tiltakslim fyri Eyðstein Ó. Poulsen

**Klaksvíkar Býráð 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt at lata Símun á Høvdanum taka sæti í býráðnum til fundin.

## 53/24
## 23/00493-1 Dagføring av almenna ásetingartekstinum í byggisamtyktini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.06.2024 | 66/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 27.06.2024 | 53/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Umsitingin leggur fram uppskot til ískoyti til D-økir (fríøki) og A-økir (blandað íbúðar- og vinnuøki) í almenna ásetingartekstinum fyri Klaksvíkar kommunu.

A-økir:
Ískoytið snýr seg um at loyva, at í eini útstykkingarætlan kann partur av eini grundøkjavídd liggja í felagsøki.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Tekstdømi: "*Í samband við útstykkingar: Fyri stakhús og raðhús kann ein partur av grundsøkjavíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 m$^2$ fyri hvørt grundstykki. Felagslendi: fríøki, spælipláss, felags parkeringsøki o.tíl. Veglendi verður ikki at roknað sum felagslendi.*"

Umsitingin metir hetta er eitt hent "amboð" ísb. við komandi útstykkingar, tí hetta letur upp fyri smærri grundstykkjum, og harvið kann eitt øki rúma fleiri grundstykkjum (búeindum) men við tí kravi, at t.d. felagsparkering og rekreativ fríøkir verða skipað til gagns fyri økið.

D-økir:
Víðka heimildina at loyva serstaka bygging í D-øki t.d. parkeringspláss og trafostøðir o.a.
Tekstdømi: "*Í serligum føri kann býráðið geva loyvi at byggja og skipa t.d. tøknihús, trafostøð, parkeringsøki í fríøki.*"

Við hesi heimild kann byráðið loyva slíkari bygging uttan grannahoyring og almenna hoyring.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál 11: Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Mælt verður til at heimila umsitingini at lýsa lýstu byggisamtyktarbroytingarnar fyri almenna ásetingartekstin fyri Klaksvíkar kommunu.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. juni 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-06-2024.

**Klaksvíkar Býráð 27. juni 2024:**
Tilmælið frá UBN 17-06-2024 einmælt samtykt.

## 54/24
## 24/00532-6 Matr.nr. 759g á Skarðhamri - umsókn um meirøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.06.2024 | 68/24 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 19.06.2024 | 28/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 27.06.2024 | 54/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Búnaðarstovan biður um kommununnar ummæli til umsókn frá fyritøku um keyp av uml. 900 m$^2$ av matr.nr. 759a til samanleggingar við matr.nr. 759g.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
26. jan. 2023 viðmælti býráðið líknandi umsókn frá aðrari fyritøku. Tá bleiv samstundis samtykt at víðka - tað í byggisamtyktini útlagda - vinnuøkið á Skarðhamri tilsvarandi niðaneftir, í fullari longd.
12. okt. 2023 góðkendi Umhvørvismálaráðið byggisamtyktarbroytingina.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 – burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. des. 1962 um matrikulering og sundurbýti – seinast broytt 1. mars 2022
Løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð – seinast broytt 23. des. 2018
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

**Tilmæli:**
Havandi í huga nýliga víðkaða B2-økispartin, sum leggur upp til víðkanir niðaneftir, mælir Tekniska Umsiting til at ganga umsóknini á møti, treytað av, at umsøkta lendi verður lagt saman við matr.nr. 759g

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. juni 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 31-05-2024.

**Havna- og Vinnunevndin 19. juni 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 31-05-2024.

**Klaksvíkar Býráð 27. juni 2024:**
Tilmælið frá HaVN 19-06-2024 einmælt samtykt.

## 55/24
## 24/00674-2 Marknaumskipan - matr.nr. 201a, 203b og 204a í Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.06.2024 | 69/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 27.06.2024 | 55/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til marknaumskipan millum matr.nr. 201a, 203b og 204a í Klaksvík.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

**Tilmæli:**
Umskipanin er í tráð við ásetingarnar í byggisamtyktini.
Tekniska Umsiting mælir tí til at viðmæla umsóknini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. juni 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-06-2024.

**Klaksvíkar Býráð 27. juni 2024:**
*Annika S. Biskopstø luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni*
Tilmælið frá UBN 17-06-2024 einmælt samtykt.

## 56/24
## 24/00543-1 Uppnormering til Barnaverndartænastuna í Norðoyggjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 21.05.2024 | 30/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.05.2024 | 36/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.06.2024 | 55/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 27.06.2024 | 56/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 7. mai 2024, verður greitt gjøllari frá málinum.

Almannamálaráðið og Løgtingsins Umboðsmaður hava í 2021 og 2022 gjørt kanningar av barnaverndarøkinum. Báðar kanningar koma til ta niðurstøðu, at neyðugt er at hyggja eftir arbeiðstrýstinum og meta um, um tað er gjørligt m.a. at uppnormera, bæði fyri at tryggja góðskuna í arbeiðnum á barnaverndartænastunum, men eisini fyri at lætta um arbeiðið hjá verandi starvsfólki.

Normeringin hjá BVT í Norðoyggjum pr. mai 2024 er 255 tímar um vikuna. Teir eru deildir soleiðis: leiðari 40 tímar, sálarfrøðingur 40 tímar, 4 sosialráðgevar á 35 tímar 140 tímar tilsamans, og skrivari 35 tímar.

Pr. mai 2024 hevði BVT í Norðoyggjum 106 virkin barnaverndarmál.

Mett er, at tørvur er á uppnormering á 35 tímar, og at BVT samstundis skipar seg við einum fakligum samskipara. Tá verður mett, at BVT hevur fortreytir at halda galdandi lógir og krøv til málsviðgerð og møguleika at tryggja eitt gott fakligt arbeiði.

**Burðardygd og heimsmálini:**
3. mál. Tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri

**Lógargrundarlag:**
§ 5 og 68 í Lóg um barnavernd.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Lønarkostnaðurin at seta ein sosialráðgeva 35 tímar um vikuna er á leið kr. 430.000 um árið. Kostnaðurin er tengdur at starvsaldri. Afturat hesum verður eisini neyðugt at keypa teldu o.a.

Í inniverandi fíggjarári (2024) verður meirkostnaðurin avmarkaður av, at ein setan helst byrjar umleið 1. september, svarandi til ein triðing av lønarkostnaðinum, sum kann berast innan fyri verandi fíggjarkarm.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður biðið um heimild til, at Barnaverndartænastan verður uppnormerað, at fara undir tilgongdina at lýsa eftir einum sosialráðgeva afturat og at skipa BVT eftir tí í hesum tilmæli útgreinaða leisti.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 21. mai 2024:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 07.05.24.

**Fíggjarnevndin 27. mai 2024:**
Ein meiriluti, KHJ, ASJ, OáL og TJL, tekur undir við B&U 21-05-2024.
Ein minniluti, JS, mælir til, at málið verður tikið uppaftur, eftir at innlit er fingið í GAIS-starvsfólkakanningina.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2024:**
Ein meiriluti, KHJ, ASJ, OáL og TJL, tekur undir við meirilutanum í FíN 27-05-2024.
Ein minniluti, JS, mælir til, at fleiri sosialráðgevarar verða settir, vísandi til GAIS-kanningina.

**Klaksvíkar Býráð 27. juni 2024:**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 25-06-2024; tað varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, SáH, SVJ og TJL), 1 atkvøðu ímóti (JS) og ASJ og ÓML atkvøddu ikki.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

## 57/24
## 21/01807-47 Møguligar viðtøkubroytingar

## 58/24
## 23/00804-6 Umsorganarheimið Gloria

## 59/24
## 22/00549-106 Støðutakan til tilboð upp á ogn

## 60/24
## 24/00046-7 Vegføring/dagføring av leigusáttmála

## 61/24
## 24/00632-11 Mgl. umfígging/ lántøka

## 62/24
## 24/00643-3 Umsókn um leigustykki

Fundurin lokin kl. 19:20